

**FARA ALLAN VEGIN**

*Tey, sum mótmæla, at fríøkið við Sandá, verður tikið til nýggja kirkju og til bygging yvirhøvur, geva ikki skarvin yvir, men eru til reiðar at fara so langt, tey sleppa fyri at bjarga Sandá, sum tey siga*

# Løgdu trýst á býráðslimir

**MÓTMÆLI** Fólk, sum vilja varðveita fríøkið við Sandá, har ætlanin er at byggja nýggja kirkju, møttu fjølment upp í býráðnum í gjárkvøldið við skeltum fyri at leggja býráðslimir undir trýst, men tað gekk ikki eftir vild

Áki Bertholdsen

Býráðslimir í Havn vórðu lagdir undir trýst, tá ið teir í gjárkvøldið skuldu taka støðu til at broyta byggisamtyktina fyri eitt stykki ímillum Sandá og Støðlagøtu, so at ein nýggj kirkja kann byggjast á stykkinum.

Eini 30 mótmælisfólk møttu upp á býráðsfundinum við skeltum um at bjarga Sandá í eini roynd at ávirka býráðslimirnir.

Men tað gekk ikki heilt eftir vild, tí eftir at hava kjakast í ein tíma um máli, samtykti ibýráðið samtykti kortini at broyta byggisamtyktina, so at ein kirkja kann byggjast á tí 4000 fermetra stóra stykkinum.

Býráðslimir, sum atkvøddu fyri, løgdu dent á, at ein nýggj kirkja á stykkinum fer ikki at nerva Sandá, tí hon skal byggjast minst 20 metrar frá sjálvari ánni.

Tvørtur ímóti hildu teir, at ein kirkja kann verða eitt prýði fyri økið.

Hetta merkir kortini ikki, at tað er klárt a byggja kirkjuna, tí tað gevur býráðið ikki byggiloyvi til, fyrrenn allar tekningar fyriliggja og umsókn er komin um byggiloyvi.

## Býráðslimir skinkla

Ein av teimum, sum varð heitur talsmaður fyri at broyta byggisamtyktina, var Jan Christiansen, sum vísti á, at hetta er eitt gamalt mál í býráðnum og at bæði byggi- og býarskipanarnevndin, fíggjarnevndin og alt býráðið, sum tað er, hava óteljandi ferðir tikið einmælt undir við málinum og tí harmaðist hann um, at býráðslimir nú vóru farnir at skinkla, hóast ikki eitt komma var broytt í ætlanini.

Hetta stykkið, sum ætlanin nú er at byggja kirkjuna á, er eitt stykki, sum Býráðið sjálvt einmælt hevur samtykt at vísa kirkjuráðnum á Argjum á til nýggja kirkju.

## Lurta eftir fólkinum

Tann býráðslimurin, sum var ídnastur fyri at varðveita fríøkið, var Jógvan Arge.

Hann dugdi ikki at síggja nakað sum helst skeivt í at býráðslimir lurtaðu eftir fólkinum.

Hann vísti á, at 245 mótmæli eru komin býráðnum í hendi og hann dugdi ikki at síggja, at tað skuldi leggjast býráðslimum til last, at teir lurtaðu eftir hesum mótmælum.

Hann vísti á, at Tórshavnar Býráð hevur lagt stóran dent á at varðveita tær stóru áirnar og hevur ikki vilja givið loyvi til bygin nærri enn 50 metrar frá teimum og hann helt, at tað hevði stóran týdning at halda fast um tað.

- Fyri trivnaðin í kommununi hevur tað alstóran týdning, at luftin og grønu økini kring hesar áir verða varðveiddar, segði Jógvan Arge.

Levi Mørk, sum eisini hevur atkvøtt fyri at broyta byggisamtyktina, so at kirkja kann byggjast, viðgekk, at hann hevði sovið í tímanum, men hann helt ikki at nakað forgjørt var í at lurta eftir fólkinum.

Eisini Marin Katrin Frýdal viðgekk, at tá ið hon hevur atkvøtt fyri ætlanini áður, visti hon ikki, at kirkjan skuldi standa so nær ánni.

Eisini Elin Lindenskov hevur tikið undir við at byggja krkjuna, men nú hevur hon broytt støðu, tí tað ørkymlar hana, at kirkjan skal standa bara 20 metrar frá ánni, tí áður hevur býráðið hildið fast um eitt mark upp á 50 metrar.

aki@sosialurin.fo

**» Hevði Býráðið felt málið, hevði tað verðið so nógv lættari**

# Stríðið er ikki tapt enn

**ARGJA KIRKJA** Tey, sum vilja varðveita fríøkið, har ætlanin er at byggja nýggja kirkju á Argjum, stríðast víðari

Áki Bertholdsen

- Enn er langur vegur eftir á mál og vit hava ikki givið skarvin yvir enn.

Tað sigur Steen Juul Pedersen, sum hevur verið talsmaður hjá teimum, sum hava mótmælt, at bygt verður á fríøkinum ímillum Sandá og Støðlagøtu.

Hann leggur dent á, at tað er als ikki eini nýggjari kirkju, at tey eru ímóti.

- Vit eru hørm um, at fólk hava fingið ta fatan, at vit eru ímóti kirkjuni,sigur hann.

Men hann leggur afturat, at tað er ein misskiljing.

- Vit eru ímóti, at nakað verður bygt yvirhøvur á stykkinum og vit høvdu mótmælt, sama hvønn bygning, talan var um at byggja á økinum.

## Ikki tapt enn

Hinvegin er hann sannførdur um, at stríðið um hendan blettin við Sandá, er ikki tapt enn, hóast Tórshavnar Býráð í gjárkvøldið samtykti at gera eina serstaka byggisamtykt, so at slóðast kann fyri, at kirkja kann byggjast á stykkinum.

- Tað hevði bara verðið so nógv lættari, hevði Býráðið felt málið sjálvt, sigur hann.

Nú skal málið so fyri í friðingarnevndini og har ivast hann ikki í, at tey, sum hava mótmælt, verða mett at vera hoyringspartur og verða innkallað at siga okkara hugsan.

- Og verður tað neyðugt, verður málið eisini lagt fyri kærunevndina í lendismálum, saman við teimum mótmælum, sum eru latin inn.

## Ikki so einfalt

Steen Juul Pedersen er sannførdur um, at tað er til teirra fyrimun, at tað er so tepur meiriluti í býráðnum fyri at gera eina serstaka byggisamtykt, so at byggjast kann á stykkinum.

- At býráðið er so ósamt um málið, hevur uttan iva eisini sína ávirkan, tá ið avgerðin skal takast í friðingarnevndini og kærunevndini, tí tað ger tað ikki so lætt at taka støðu, sigur talsmaðurin.

Nú hevur onkuntíð verðið ført fram, at tað er ikki fríøkið, tit eru so eym um, men at veruliga orsøkin til mótmælið er bara tann, at summi av tykkum fara at missa útsýnið?

- Tað er ikki rætt, í øllum førum ikki hjá mær, tí eg missi onki útsýni. Men tað er uttan iva rætt, at summi av teimum húsunum, sum koma at standa næst kirkjuni, fara helst at fella nakað í virði.

- Høvuðsorsøkin til mótmælið er, at vit vilja varðveita hetta friðaða økið, sigur Steen Juul Pedersen.

aki@sosialurin.fo

Meiri um sama evni á síðu 22-23